# ÚTLOND

# Natascha var burturi í átta ár

**Fyri átta árum síðani hvarv tann 10 ára gamla Natascha Kampusch í Wien. Nú er hon komin afturíaftur**

Mikudagin eydnaðist tað Nataschu Kampusch at flýggja frá manninum, sum hevði havt hana sitandi í einum bilhúsi í samfull átta ár. Hon var ein vanlig tíggju ára gomul smágenta, tá hon hvarv. Nú er hon vaksin kvinna.

Øll í Eysturríki hoyrdu um ta tíggju ára gomlu gentuna, tá hon brádliga hvarv tann 2. mars í 1998. Stór løgreglulið vórðu sett at leita eftir gentuni. Løgreglan steðgaði 700 vøruvognum, men til fánýtis, og at enda kom løgrewglan til ta niðurstøðu, at gentan helst var endað í Ungarn.

Millum tey mongu, sum løgreglan avhoyrdi tá, var tann 36 ára gamli Wolfgang Priklopil, men hóast hann hevði ilt við at sannføra løgregluna um, hvar hann hevði verið, tá Natascha hvarv, gjørdi løgreglan av at lata hann sleppa.

Øll høvdu mist vónina um at síggja gentuna aftur á lívi, tá hon brádliga bankaði á dyrnar í einum húsum í tí lítla býnum Strashof mikudagin.

– Hon var sinnilig. Tað týdningarmesta er nú at sannføra hana um, at hon er sloppin leys, og at henni nýtist ikki at stúra fyri manninum, sum burturflutti hana, sigur Erich Zwettler hjá eysturríksku løgregluni við DPA.



*Natascha Kampusch sum tíggju ára gomul*


Advokatskrivstovan

Fr. Petersensgøta 9 · Postbox 6 · FO-110 Tórshavn
Tel (298) 311145 · Fax (298) 311525



**Ognirnar Tinghúsvegur 44 og 46**
**ávíkavist matr. nr 449 a og 450, Tórshavn**

Vegna Føroya Skiftirætt verða ognirnar lýstar til sølu.

Talan er um tvey grunddøki við ástandandi sethúsum, sum eru samanbygd tvørtur um mark.

Matr. nr. 449 a (nr. 44)

Stykkið er 520 m2, og umframt húsini er eisini hjallur og stór garaga á stykkinum. Húsini eru helst uml. 100 ára gomul, byggiárið er ikki upplýst. Húsini eru bygd sum sethús við kjallara, miðhædd og lofti, uml. 40-50 m2 hvør hædd. Kjallarin er óinnrættaður, miðhæddin hevur verið nýtt til vinnuligt endamál. Á loftinum er innrættað íbúð við gangi, køki, stovu og tveimum kømurum. Grundi er laðað, húsini eru úr timbri, klødd við tjørupappi og tekjan er av alumuminium.

Matr. nr. 450 (nr. 46)

Stykkið er 132 m2. Húsini eru uml. 90 ára gomul við kjallra, miðhædd og lofti, uml. 50 m2 hvør hædd. Harafturat er tilbygningur, sum stendur inni á matr. 449 a. Grundin er laðað, húsini eru annars gjørd úr timbri og klødd við tjørupappi. Tekjan er úr aluminium.

Kjallari: Tvey kjallararúm
Miðhædd: Gangur, køkur, stova, wc og trappa uppá loftið.
Loft: Gangur, 4 kømur og wc.

Bæði húsini krevja stórar ábøtur. Hinvegin er talan um tvey grunddøki, tilsamans 652 m2 mitt í býnum við góðum møguleikum fyri um- og nýbygging til vinnuligt og bústaðarendamál.

Ognirnar verða seldar undir einum og um hóskandi boð fæst.

Skiftirætturin tilskilar sær rætt at velja millum innkomin tilboð og til ongum at taka av.

Nærri upplýsingar um ognirnar fáast frá

**Advokatskrivstovuni**
**Fr. Petersensgøtu 9**
**100 Tórshavn**
**Tel 311145**
**att: Fríða Patursson, adv. (frp@jurs.fo)**
**ella skrivaran**
**Maibritt Johannesen (maj@jurs.fo)**

Sosialurin 341800


## Minur og granatir

Pápin var tann fyrsti, sum fekk at vita, at Natascha var komin afturíaftur, og hann var sum vera man skjótur á løgreglustøðina at síggja gentuna aftur.

– Hon tók uppaftur og uppaftur, at hon elskaði meg, segði hann sinnisrørdur við fjølmiðlarnar.

Eysturríkska løgreglan hevur verið sparin við upplýsingum um, hvussu gentan hevur havt tað øll hesi átta árini, hon hevur hildið til í bilhúsinum hjá Wolfgang Priklopil. Tað er tó komið fram, at hon hevur ikki verið fyri kynsligum ágangi, men at hon skuldi vísa burturflytara síinum virðing í gerandisdegnum. Hon hevði bæði útvarp og sjónvarp í bilhúsinum, og hon slapp eisini at lesa bløðini. Men hon kundi ongantíð kenna seg trygga, tí hon hevði fingið at vita, at bæði minur og granatir vóru í bilhúsinum, og at hon tí skuldi ansa sær.

## Flýddi til grannan

Tað var ikki fyrr enn seinni, at Natascha skilti, at tað bar til at flýggja frá Wolfgang. Hann var farin at hugsa um at keypa sær eini onnur hús, og tað vísti seg, at hann læsti ikki bilhúsið, tá hann fór at hyggja eftir húsum.

Mikudagin gjørdi Natascha av at flýggja yvir í garðin hjá grannanum. Kvinnan, sum búði í grannahúsunum, ringdi til løgregluna og boðaði frá, at eitt barn gekk og mól í garði hennara. Løgreglan var skjót á staðið.



*Wolfgang Priklopil var sambært grannunum eitt sindur egin*

– Góðan dag. Eg eiti Natascha Kampusch!

Løgreglan í Wien heldur, at tann 44 ára gamli burturflytarin gjørdist bangin, tá nakrir løgreglumenn fóru at leita eftir leivdunum av einum barni uttan fyri ein djóragarð í býnum. Ein fangi hevði greitt myndugleikunum frá, at ein av hinum fangunum segði seg hava beint fyri Nataschu Kampusch og jarðað líkið uttan fyri djóragarðin.

## Tók lívið av sær

Hvussu er og ikki, so bað Wolfgang P. ein vinmann hjálpa sær, tí løgreglan var farin at leita eftir sær. Sambært vinmanninum segði hann, at hann hevði koyrt við kenning, og at løgreglan tí vildi hava fatur á sær.

Vinmaðurin fór eftir Wolfgang P., men tá teir høvdu koyrt eina løtu, bað Wolfgang hin steðga. Løtu seinni fekk løgreglan boð um, at ein maður hevði beint fyri sær við at leypa út fyri eitt tok. Kanningarnar staðfestu skjótt, at talan var um Wolfgang Priklopil.

## Grannarnir undrast

Í dag spyrja grannarnir í Strashof, hvussu í verðini Wolfgang Priklopil kundi fjala Nataschu í bilhúsinum, uttan at nakar teirra varnaðist tað. Millum teirra er fyrrverandi løgreglumaðurin Franz Hafergut. Við blaðið Die Presse sigur hann, at síðani mikudagin hevur hann fleiri ferðir spurt seg sjálvan, hvussu tað ber til, at ein so royndur løgreglumaður sum hann ikki skal hava varnast nakað. Franz Hafergut greiðir frá, at Wolfgang Priklopil var fyri tað mesta fyri seg sjálvan. Av og á plagdi hann at skjóta dúgvur og smáfuglar.

– Var tað veruliga Wolfgang, sum burturflutti Nataschu, spyr ein annar granni. Tann 66 ára gamli Josef Jantschek hevur ilt við at trúgva tí. Hann var tann einasti av grannunum, sum hevði nakað samband við Wolfgang. Væl var hann eitt sindur egin, men kortini ikki serstakur á nakran hátt.

– Eg sá hann mánadagin. Tá var hann í ferð við at umvæla bremsurnar á bilinum, sigur Josef Jantschek við Die Presse.